FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 25. juli 2026

Hoyringarskriv til lógaruppskot um at útluta fiskidagar til bólk 5B

Føroya Reiðarafelag hevur fingið lógaruppskot um serstakar fiskidagar til bólk 5B fyri fiskiárið 2026 til hoyring. Samanumtikið tekur Reiðarafelagið ikki undir við hesum uppskoti og mælt verður til at taka uppskotið aftur.

Reiðarafelagið tekur annars fult undir við, at umsitingarætlan og veiðiregla verða endurskoðað og eftirmett í einum arbeiðsbólki, har umboð úr øllum fiskiflotanum eru umboðað. Úrslitið av hesi eftirmeting kann síðani verða sett í verk í nýggjari skipan. Hetta eigur tó at verða gjørt fyrst, áðrenn nýggir dagar verða útskrivaðir.

Talan er um at útluta 750 serstakar fiskidagar til bólk 5B, sum tekur støði í óbrúktum døgum frá 2024. Hendan útlutingin fer fram uttanum ta umsitingarætlan, sum hevur verið brúkt síðan 2021, og sum hevur stýrt talinum av fiskidøgum og fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum.

Hendan umsitingarætlanin hevur havt við sær, at fiskidagatalið er lækkað uml. 40% hjá flestu bólkum í hesum tíðarskeiði. Serliga stórar skerjingar vórðu gjørdar bæði í 2024 og 2025 vegna støðuna í toskastovninum, tá umsitingarætlanin ikki varð fylgd.

Eingin nýggj umsitingarætlan er gjørd, sum umboð fyri vinnuna hava verið við til at viðgera, men kortini verða serstakir fiskidagar nú útlutaðir til ein ávísan bólk. Eingin viðgerð hevur verið av umsitingarætlanini, og hvussu hon skal virka frameftir. Broytingar í hesi skipan eiga at verða viðgjørdar, áðrenn tær verða framdar.

Reiðarafelagið skilir væl, at ikki-fullriknir útróðrarbátar ynskja at fáa fleiri fiskidagar. Men hetta eigur ikki at verða gjørt uttanum umsitingarætlanina og krevur eina nágreiniliga viðgerð frammanundan. Hetta letur upp fyri, at einstakir bólkar kunnu fáa serstakar dagar við grundgeving um, at dagarnir eru brúktir. Tað er eisini við til at máa grundarlagið undan fiskidagaskipanini sum heild.

Skerjingin av fiskidøgum hevur havt við sær, at fleiri skip eru løgd seinastu árini. Manningar eru uppsagdar og hava mist sína hýru. Heilt ítøkiliga eru tvey línuskip løgd seinastu tvey árini vegna vantandi fiskidagar. Hesi skip ella bólkar hava ikki fingið serstakar fiskidagar av hesi orsøk, tí at umsitingarætlanin loyvir ikki hesum. Eisini aðrir bólkar eru sperdir vegna vantandi fiskidagar.

Skipanin hevur higartil virkað so, at flotin skal tillaga seg til fiskidagatalið. Hetta uppskotið broytir hesa skipan, har ávísir bólkar kunnu fáa serstakar fiskidagar, tá ið dagarnir eru brúktir. Spurningurin er tí, hvørjari skipan føroysk fiskiskip skulu vænta sær at virka undir komandi árini.

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

Týdningarmikið er, at fiskidagaskipanin og umsitingarætlan eru forútsigiligar, soleiðis at skip og bátar vita, hvørjar fortreytirnar eru at virka í hesi vinnu í mong ár frameftir. Eisini er týdningarmikið, at skipanin er gjøgnumskygd, og at broytingar eru væl undirbygdar.

Hetta lógaruppskotið brýtur við meginregluna um, at allir bólkar verða viðfarnir á sama hátt og við støði í somu skipan. Greitt er, at bólkarnir í fiskidagaskipanini fiska av somu stovnum av serliga toski og hýsu. Tí er umráðandi, at øll skipanin verður viðgjørd undir einum, og at serstakir dagar ikki verða útlutaðir til einstakar bólkar.

Nýtslan av fiskidøgum hjá línuskipum í bólki 3 higartil í ár er lutfalsliga stór, og væntandi verða nærum allir fiskidagarnir brúktir í hesum bólki. Tað vil siga, at helst verður eingin buffari at brúka komandi ár, og fleiri einstøk skip vanta longu nú fiskidagar. Eingi útlit eru fyri, at hesi skip nú fáa fleiri fiskidagar av hesi orsøk. Meðan nakrir bólkar verða skerdir og mugu tillaga virksemið við at leggja skip ella fara undir virksemi aðrastaðni, fáa aðrir bólkar í somu skipan fleiri serstakar dagar útlutaðar.

Buffarin hjá línuskipum í ár verður uml. 165 fiskidagar og letur upp 1. oktober. Tí verða fleiri línuskip væntandi løgd í november vegna vantandi fiskidagar. Komandi ár verða væntandi nærum eingir dagar í buffaranum, og tá verða skipini løgd fyrr um heystið.

Viðvíkjandi trolarum í bólki 2 er støðan tann, at væntandi verða munandi fleiri fiskidagar brúktir í ár í mun til undanfarna ár. Longu nú hava ávís skip brúkt ein lutfalsliga stóran part av sínum fiskidøgum, hóast fleiri óbrúktir dagar eru í skipanini. Ein stórur trupulleiki er, at 60%-reglan í sjófeingislógini forðar fyri, at fiskidagar kunnu flytast til tey skipini, sum hava tørv á døgum. Hetta átti at verið broytt skjótast gjørligt, og 60%-reglan kundi verið avtikin.

Viðmerkingarnar til lógaruppskotið siga, at bátar í bólki 5 avreiða meira av smáum fiski enn hinir bólkarnir í fiskidagaskipanini. Hetta er eisini staðfest í svari til skrivligar fyrispurningar á tingi. Eisini av hesi orsøk átti hesin spurningur at verið tikin upp í einum størri høpi.

Viðmerkingarnar siga, at bólkur 5B fiskaði uml. 10% av toskinum, sum varð avreiddur í fjør. Hetta talið er helst nakað hægri, tí at toskur av Íslandsrygginum vanliga skal dragast frá, áðrenn mett verður um, hvussu nógv er fiskað av toski á føroyska landgrunninum. Harumframt veiðir bólkur 5B meira av smáfiski enn aðrir bólkar, og tað merkir, at veiðan av einstøkum fiskum er lutfalsliga hægri hjá hesum bólki enn teimum størru skipunum.

Gongdin er, at tá ið meira er at fáa ella at fiskaprísurin er góður, fara munandi fleiri bátar at avreiða enn áður. Hetta er eisini gongdin seinastu tíðina, har talið av bátum, sum avreiða í bólki 5B, er økt munandi. Prísurin á toski og hýsu er høgur í løtuni, og tað eggjar sjálvandi fleiri bátum at rógva út. Fiskaprísir hava verið lutfalsliga høgir seinastu tvey árini, og tí eigur at liggja meira eftir fyri hvønn brúktan fiskidag.

Ein annar vandi, sum verður staðfestur í viðmerkingunum til lógaruppskotið, er, at MSC góðkenningin fyri upsa kann koma í vanda, um umsitingarætlanin ikki verður fylgd. Upsi veiddur undir Føroyum hevur havt MSC góðkenning seinastu mongu árini, og hetta hevur havt stóran týdning fyri, at tað hevur loyst seg hjá føroyskum virkjum at virka og útflyta upsa serliga til marknaðir í Norður- og Vestureuropa.

Viðmerkingarnar til lógaruppskotið siga: *Ein avgerð um at lata fleiri fiskidagar inn í skipanina, enn veiðireglan leggur upp til, kann ávirka úrslitið av eftirmetingini í ICES og arbeiðið hjá vinnuni við at fáa MSC-góðkenningar í fiskiskapi í føroyskum sjógvi*.

Landsstýrismaðurin eigur at taka hendan vandan í álvara og gera eina ítøkiliga meting av, hvørjar avleiðingarnar kunnu vera. Greitt er, at hendan góðkenningin hevur havt stóran týdning fyri trolarar í bólki 2 og flakavirkir. Gongdin í bólki 2 hevur verið vánalig í mong ár, men seinastu árini er loksins vend komin í, og skip og virkir hava havt lutfalsliga góð úrslit. Hetta merkir aftur, at fiskimenn við hesum skipum fáa betri hýru, og áhugin fyri at vera við hesum skipum er størri enn áður.

Fært hevur verið fram, at talan er um eina mentan og siðvenju í Føroyum, at fólk kunnu fara til útróðrar. Mælt verður ikki til, at útróður við Føroyar skal steðga. Tó er umráðandi, at fiskiskapurin er skipaður við nøkrum meginreglum, sum partarnir í vinnuni hava møguleika at viðgera, áðrenn tær verða settar í verk.

Víst verður eisini á, at skipanin við einum buffara í bólki 5 varð sett í verk í fjør, og hesin buffari kemur sum skilst at virka frá 1. oktober í ár, har óbrúktir dagar frá 2025 eru tøkir hjá hesum bólki, eins og hjá hinum bólkunum. Harumframt vórðu eisini 2.150 fiskidagar útlutaðir serstakt til bólk 5B í 2019, tá ið fiskiskapurin var serliga góður, og hesir dagar eru framvegis partur av skipanini.

Viðmerkingarnar til verandi lóg um sjófeingi sigur, at fyrisitingin av fiskidagaskipanini verður skipað við eini umsitingarætlan, sum er ein politisk langtíðarsemja um áseting af fiskidøgum. Eisini stendur í viðmerkingunum, at umsitingarætlanin skal taka vinnulig atlit, sum tryggjar ein ávísan stabilitet.

Viðmerkingarnar eru soljóðandi: *Ætlanin er somuleiðis, at fyrisitingin av fiskidagaskipanini verður skipað við eini veiðireglu og umsitingarætlan, sum er ein politisk langtíðarsemja um, hvussu fiskidagaskipan skal umsitast yvir longri áramál. Endamálið við slíkari ætlan er ikki bara at stuðla undir góða stovnsrøkt og lívfrøðiliga burðardygd; umsitingarætlanin skal eisini taka vinnulig atlit, til dømis at tryggja vinnuni ávísan stabilitet í fiskimøguleikunum, við at fiskidagatalið ikki sveiggjar ov nógv frá ári til ár ella, at fiskidagatalið verður ásett fyri meira enn eitt ár í senn*.

Hetta uppskotið setir eisini spurnartekin við, hvussu umsitingarætlanin fer at virka frameftir. Vandi er fyri, at tilmæli hjá Havstovuni við støði í umsitingarætlanini verður, at fiskidagatalið hjá bólki 3-5 verður skert við fimm prosentum aftur komandi ár. Hetta tí, at antin verður veiðitrýstið fyri tosk mett at vera omanfyri vandamarkið, ella verður støddin á toskastovninum mett at vera niðanfyri vandamarkið í umsitingarætlanini.

Spurningurin er, hvussu tann støðan verður handfarin, tá ið fleiri bólkar vanta fiskidagar, og tilmælið verður, at dagatalið skal skerjast við 5 prosentum í 2027. Hetta krevur eina nærri viðgerð av støðuni og umsitingarætlanini sum heild. Um broytingar skulu gerast í umsitingarætlan, ella um fiskidagatalið skal ásetast av nýggjum, eigur hetta at verða gjørt í eini skipaðari tilgongd, har allir bólkar eru við.

Stefan í Skorini, stjóri

Føroya Reiðarafelag